# H71 greiddi sína skyldu



*Esbern Patursson og H71 runnu uppflytararnar um koll*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Team Klaksvík hótti ongantíð hoyvíkingarnar, sum hava vunnið tríggjar dystir upp í slag. H71 gera einki øðrvísi, sigur Dánjal Tórgarð

Uni Holm Johannesen

Úrslitið staðfestir munin.

32-20 vístu stóru og reyðu tølini á talvuni í Hoyvíkshøllini, tá dysturin var liðugur.

Tað varð aftur prógvað, at Team Klaksvík er ikki til reiðar at bjóða teimum bestu av.

Hoyvíkingar vóru á sigurskós frá fyrsta bríksli, og gestirnir úr Klaksvík runnu bara aftaná. Heimaliðið var væl skipað, høvdu tol og tóku av møguleikunum. H71 flutti bóltin skjótt, og gestirnir høvdu trupult við at fylgja við.

Aftaná hvíldina royndu hoyvíkingarnir hugflogið, og venjararnir framdu nógvar skiftingar. Eitt dømi var, at Jens Skipagøta, málverjin, gjørdi bart í einum álopi og smekkaði bóltin í málið hjá klaksvíkingunum.

Aftaná tveir ósigrar, hevur H71 vunnið tríggjar dystir upp í slag. Hoyvíkingar gera einki øðrvísi, sigur Dánjal Tórgarð.

– Liðið er ungt, og tað tekur tíð. Vit eru meira avgjørdir í verjupartinum nú, og tað sæst aftur, sigur Dánjal Tórgarð, sum ikki vil siga, at dysturin í gjár var hansara lættasti.

– Klaksvíkingar eru ikki vanir við leikferðina í bestu deildini, og vit revsa teir fyri mistøkini, sigur hann.

Bogdan, H71, hevur staðið seg væl í hesum kappingarárinum. Hann varð útvístur í gjár, tí hann sendi brotskast beint í trínið á málverjanum. Dómararnir mettu, at tað var orsøk tik beinleiðis reytt kort.

Tí verður hann ikki við, tá VÍF og H71 spæla mikukvøldið.

*uni@sosialurin.fo*

## **H71 – Team Klaksvík** 32-20 (18-9)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 6-3**
**20 min.: 13-8**
**40 min.: 23-11**
**50 min.: 28-16**

**H71:** Rúni Højgaard 9, Dánjal Tórgarð 7, Esbern Patursson 4, Rógvi Sørensen 3, Bogdan Florea 2, Hans Kári Hansen 2, Poul Kjartan Dam 2, Sigmund Dahl 1, Bogi Davidsen 1, Jens Skipagøta 1.
**Team Klaksvík:** Dánjal Kjærbo 7, Zarko Petrovic 5, Damir Oros 2, Jón Jacobsen 1, Beinir Heðinsson 1.
Útvísingar: H71 0 – Team Klaksvík 13
Reytt kort: Bogdan Florea, H71, og Pole J. Hansen, Team Klaksvík

## **Neistin – Kyndil** 28-28 (14-15)

Dómarar: Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

**10 min.: 6-4**
**20 min.: 10-11**
**40 min.: 20-19**
**50 min.: 25-24**

**Neistin:** Finnur Hansson 8, Heini Hanusarson 8, David Edvardsen 5, Jón Ludvig 3, Áki Mørk 2, Kári Horn 1 og Ingi Olsen 1.
**Kyndil:** Rúni Johansen 6, Bárður Johannesen 5, Josef Abrahamsen 4, Hans Áki Dal-Christiansen 4, Høgni Klein Olsen 3, Hans Arni Thomsen 2, Ken Zachariasen 2 og Kristoffur Kristoffersen 2.
Útvísingar: Neistin 8 – Kyndil 6

## **KÍF – StíF** 20-19 (10-11)

Dómarar: Sámal Paulason og Kári Hansen

**10 min.: 5-3**
**20 min.: 6-7**
**40 min.: 13-12**
**50 min.: 17-18**

**KÍF:** Andrias Nielsen 6, Teitur Joensen 3, Arnbjørn Hansen 3, Ási Dam 3, Tony Weyhe 2, Ingi Johannesen 1, Regin Petersen 1.
**StÍF:** Leivur Justinussen 5, Jóanes Prestá 5, Jørmund Joensen 3, Jógvan Berg 3, Marius Joensen 2, Høgni Jensen 1.
Útvísingar: KÍF 3 – StÍF 3



GRANNAUPPGERÐ

*Havnarfeløgini samdust um stigini í Ítróttarhøllini á Hálsi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# »Havnarfight!«

**HONDBÓLTUR** Tað er soleiðis, Henrik Gerster, venjari hjá Kyndli, lýsir grannauppgerðini í gjár. Neistin hevur mist fyrsta stigið í hesum kappingarárinum

Uni Holm Johannesen

Henrik Gerster er errin.

Hann er fyrsti venjarin, sum tekur stig frá Neistanum í hesum kappingarárinum.

Gerster sigur við heimasíðuna hjá Neistanum, at grannauppgerðin var eitt ordiligt »havnarfight.«

– Tú noyðist at spæla við fullari megi, um tú skal fáa stig móti Neistanum. Vit eru troyttir seinastu løtuna og gera fleiri mistøk. Men eg eri errin um úrslitið, sigur Henrik Gerster við neistin.fo.

### Fylgdust allatíð

Úrslitið var 28-28.

Tað er rættvíst, at havnarliðini fingu eitt stig hvør. Neistin og Kyndil togaðust um leiðsluna allatíðina, og einki av liðunum hevði tamarhaldið.

Kyndil var hinvegin á vinnarakós, tá fýra minuttir restaðu í. Støðan var 27-25, men grønu havnarmenninir stóðu ikki ímóti seinastu atsóknunum hjá Neistanum.

Neistin javnaði í seinasta minuttinum, og Kyndil megnaði ikki at svara aftur til seinast.



*Kyndsilmenn vóru sera stríðshugaðir, og stóðu teir seg serliga væl í verjupartinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Væl fyrireikaðir

Kyndilsmenninir vóru sera stríðshugaðir.

Serliga í verjupartinum stóðu teir seg væl og nærlagdir stegðaðu teir mótstøðumonnunum.

– Vit vóru væl fyrireikaðir og spældu væl, sigur Henrik Gerster.

Finnur Hansson og Heini Hanusarson vóru støðugir skjúttar hjá Neistanum. Teir skutu átta mál hvør.

# KÍF aftur á beint

**HONDBÓLTUR** Eitt stig av fýra møguligum var úrtøkan hjá kollfirðingum undan dystinum móti StÍF í gjár. KÍF vann eitt fet í kapprenningini um finalupláss í gjár

Uni Holm Johannesen

KÍF er framvegis liðið, sum hóttir Neistan í oddastríðnum.

Tvey stig skilja ovastu liðini í løtuni.

Tað var um reppið, at kollfirðingar ikki fingu fult í heimadystinum móti StÍF í gjár.

Eitt mál var á muni, tá dysturin var liðugur.

KÍF vann 20-19. Kollfirðingarnir vóru trýstir, men hóraðu undan. Teitur Joensen skeyt avgerandi málið, tá ein minuttur restaði í.

*uni@sosialurin.fo*